Børn hava brúk fyri vaksnum sum fyrimynd

Børn megna bæði meira og minni, enn tey vaksnu halda.

Tá børn eru í trupulleikum, hava tey vaksnu ábyrgdina

At tola eitt sindur av hevur týdning fyri góðan trivnað

# Felags foreldrafundur

Børn eru sosial, um tey vaksnu eru tað

## *Góðu foreldur*

**Vit vilja fegin bjóða tykkum til felags foreldrafund.**

Danski sálafrøðingurin **Jens Andersen** fer at halda fyrilestur fyri okkum um tann týdning, ið foreldur hava á barnisins menning, felagskap, trivnað og læring í skúlanum.

Fyrilesturin er serstakliga um, at vit sum foreldur eru fyrimyndir hjá okkara børnum og um ta ábyrgd, sum foreldraleikluturin hevur við sær, t.d. um samstarv, menning av felagsskapum og um at seta børnum krøv.

Jens Andersen er ein væl dámdur og undirhaldandi fyrilestrarhaldari, sum nýtir skemt og ítøkilig dømi úr gerandisdegnum at lýsa barnauppaling og familjulív.

**Dagur: týsdagin 20. september 2016**

**Kl.: 19 – 20.30**

**Stað: Læraraskúlahøllini**

Tiltak í samstarv við Tórshavnar Kommunu

Skúlin á Argjahamri